# Posta Stamps

Føroyar

No. 46

November 2020



- Postsøgan 150 ár
- Gróðursettur - tilflytarasøgur
- Kirkja og Hattarvík
- Eysturoyartunnilin
- Andrea Árting

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Føroysk postsøga 150 ár

**Brot úr postsøguni – hátíðarhald**
Í ár hevur føroyska postsøgan tvey hátíðarhald á breddanum. Fyrra er 150 ára dagurin fyri postlógina frá 7. januar 1871, har Føroyar á fyrsta sinni gjørdist eitt danskt postøki. Hin minnisdagurin er 45. ársdagurin síðan Postverk Føroya, nú Posta, gjørdist ein sjálvstøðugur føroyskur stovnur við ábyrgd fyri postútbering í Føroyum og heimild til at geva út føroysk frímerki.

Vit hava valt at hátíðarhalda merkisdagarnar báðar við at líta aftur um bak við stuttum brotum úr føroysku postsøguni.

**Postlógin frá 7. januar 1871**
Í bakgundini á arkinum síggja vit eitt brot av upprunatekstinum til Postlógina frá 7. januar 1871, prentað við gotiskari skrift. Hendan dagføringin av donsku postlógini, førdi við sær, at postviðurskiftini í Føroyum loksins vórðu skipað sum í restini av danska ríkinum. Frammanundan hevði kongaligi einahandilin flutt postin til Føroya, men tá einahandilin varð avtikin í 1856, fall hesin luturin á ymisk sjálvstøðug reiðarí, sum fyri samsýning fluttu postin til landið. Útberingin gekk fyri seg eftir aldargomlu skjúts skipanini, har álagt var monnum kring landið at flyta ferðafólk, farm og post víðari fyri lítið og lætt.

**Fyrstu postmenninir og postleypurin**
Í 1870 lat fyrsta postskrivstovan upp í Havn, við navnframa sýslumanninum H. C. Müller sum postmeistara. Orsakað av postlógarábótini árið eftir, vórðu tríggir postmenn nú settir í starv fyri at fáa postin víðari út um landið.

Postleiðin Tórshavn -Trongisvágur varð røkt av Jóhannis av Reyni, sum bar postin til Suðuroyar um Kirkjubø, Skopun, Sand, stundum Skúvoy - til Hvalbiar, haðani hann fór um fjall til Trongisvágs, har posturin varð útflýggjaður sýslumanninum. Fyri túrin aftur og fram, fekk Jóhannis 14 krónur.



*Postur og ferðafólk verða førd í land suðuri í Vági*

Vesturleiðin, Tórshavn – Miðvágur, varð gingin av Jákup Jacobsen. Hann gekk úr Havn til Kvívíkar, haðani hann varð fluttur við báti yvir á Fútaklett. Haðani gekk hann fyrst til Sandavágs, so til Miðvágs, har posturin varð borin í prestagarðin. Jákup fekk 8 krónur fyri túrin aftur og fram.

Á norðanleiðini, Tórshavn - Klaksvík, var Conrad Nicolaisen fyrsti postførarin. Hann fór úr Havn í báti til Søldarfjørð, gekk til Leirvíkar og haðani við báti til Klaksvíkar. Conrad fekk uml. 10 krónur fyri hvønn túr. Allir tríggir postførarnir skuldu bíða 12 tímar á endastaðnum, áðrenn teir fóru heim aftur til Havnar. Posturin varð fluttur sjey ferðir um árið.

Hvør postførari skuldi vera førur fyri at bera 25 kilo av posti við sær. Til hettar høvdu teir hvør sín lokaðan postleyp, ið varð borin á rygginum. Leyparnir vóru rættuliga stórir og posturin fylti sjáldan nógv í teimum, so teir vórðu eisini nýttir til skiftiklæðini hjá postføraranum og aðrar persónligar lutir.

Á frímerkjaarkinum sæst postleypurin hjá Conrad Nicolaisen, merktur: Thorshavn – Norderøerne. Leypurin stendur í dag á Norðoya fornminnsavni í Klaksvík.

**"Tornystarin"**

Leyparnir hjá postførarunum vóru óskotligir og alt ov stórir til mongdina av posti í 1870'árunum. Pakkar komu so at siga ikki fyri, bara brøv – og tey fyltu ikki tað stóra. Petur í Mattalág, sonur Jóhannis á Reyni, sum avloysti faðirin sum postførari á suðurleiðini, skrivaði tí til danska postverkið og spurdi, um teir ikki kundu fáa okkurt minni at bera postin í.

Hann fekk so ein sokallaðan Tornystara, ein ryggsekk úr kópaskinni sendandi, eitt sindur størri enn ein vanlig barnaskúlataska – og í honum rúmtist allur postur til sunnara part av landinum í teimum døgum. Ikki fyrr enn

eftir 1890, øktist postmongdin so mikið, at tríggir - fýra mans skuldu til fyri at røkja suðurleiðina. Umtalaði "Tornystarin" er avmyndaður á frímerkinum til vinstru.

**Postur í vandasjógvi**

Postleiðirnar í Norðoyggjum vóru yvirhøvur truplar, stundum beinleiðis vandamiklar fyrr í tíðini. Serliga har brattlendi var fyri ella har posturin skuldi flytast við báti. Einaferð í 1927 ella 28 kom postførarin Marius í Áranstovu til Mikladals í ringum veðri. Teir vóru tveir við postbátinum og Árant fór einsamallur inn við lítlabáti. Har var so mikið av brimi hendan dagin, at vanliga lendingin ikki kundi brúkast. Hann legði tí at Nevinum, eitt sindur norðanfyri lendingina.

Postskiftismaður í Mikladali tá var Jóan Magnus Eliasen, Jóan Magnus í Hússtovu. Hann fór á Nevið at taka ímóti postinum og leyp tí niður í bátin til Marius fyri at tveita postin upp á turt. Meðan hann soleiðis stóð og skuldi blaka postsekkin til Trøllanes í land, kom eitt óløgi, sum førdi við sær, at Jóan Magnus misti fótafestið, fall á bláman og hvarv. Marius var skjótur at taka eina ár, stinga hana í sjógvin og røra runt við henni undir bátinum. Onkursvegna fekk Jóan Magnus fatur á árini og varð soleiðis drigin at borði og bjargaður umborð aftur.

Søgan sigur víðari, at Jákup Dahl próstur var á staðnum tann dagin – hann skuldi til Klaksvíkar við postbátinum, men varð so skelkaður av hendingini, at hann settist aftur.

**Abbabilur**

Í 1927 gjørdi postverkið eina avtalu við Gøtu kommunu at syrgja fyri koyring av posti til Gøtu og Fuglafjarðar. Posturin skuldi avheintast í Søldarfirði ella á Skipanesi á Skálafjørðinum. Postbilurin skuldi eisini taka farm og ferðafólk við á leiðini. Bilførari var Poul Kristoffer Poulsen úr Gøtu.

Bilin á frímerkjaarkinum fekk Poul Kristoffur í 1935. Hann fekk eyknavnið abbabilur, tí abbadóttur Pouls, Petra, ikki kallaði hann annað – og navnið varð hangandi. Petra giftist fyrrverandi útvarpsstjóranum Niels Juel Arge og er í skrivandi stund júst vorðin langomma. Persónarnir í bilinum eru bilstjórin Poul Kristoffur og ferðafólkið, Kunoyar Johanna.

Sum ein kann hugsa sær, vóru líkindini til bilferðslu ikki tey bestu tá á døgum. Serliga tá regn var, hevði vegurin niðan á Gøtueiðið lyndi til at upploysast. Onkuntíð stóð so illa til at menn máttu ganga undan bilinum og fylla grót í ringastu holini. Soleiðis hvarv hvør einasta torvkrógv har um leiðir.

Tað kom meir enn so fyri, at ferðafólk noyddust at deila pláss við fenað av ymsum slag. Einferð hevði Poul Kristoffur enntá ein stóran slaktaðan tarv við í bilinum úr Fuglafirði. Høvd og klógvar vóru skorin av og avroðini tikin úr tarvakrovinum, men so mikið fylti hann, at ferðafólk til postbátin, noyddust at sita á tarvinum allan vegin til Søldarfjarðar.

**Reyðjakkarnir stempla út**

Postboðini í Havn hava altíð verið ein partur av býarmyndini. Kanska enn sjónligari áðrenn postverkið varð yvirtikið, orsaka av teimum eyðkendu donsku postbúnunum. Tað kundi minna eitt sindur um eina festliga skrúðgongu, tá postboðini um morgunin í felag fóru úr gamla posthúsinum í kommunuskúlagarðinum og út á tær einstøku postleiðirnar. Teir eldru starvsmenninir í reyðum jakka, slipsi og kasjett – aspirantarnir í svørtum jakka við gyltum knappum og kasjett.



*Starvsfólkini á posthúsinum í Havn í 1960unum*

Reyði postjakkin varð bara nýttur í Havn. Í landinum annars var jakkin svartur.

Postmenn í Havn nýttu annars jakkan tá ein starvsfelagi varð jarðaður. Sjálvt eftir at postverkið varð yvirtikið, er okkurt dømi um jaðarferð, har postmenn bóru gamla danska búnan.

Tá postverkið kom á føroyskar hendur, varð danski búnin lagdur til viks. Men undantøk vóru. Elstu postboðini kundu halda fram sum danskir tænastumenn, sum í prinsippinum vórðu útlæntir til Postverk Føroya – og sostatt halda fram við at brúka reyða jakkan. Ein av teimum var gitni postmaðurin í miðbýnum, Eiler Rubeksen, sum sæst fremstur á mittasta frímerkinum. Eiler nýtti danska búnan til hann fór frá vegna aldur.

**Blájakkarnir stempla inn**

Postboð nú á døgum skulu ikki longur ganga um fjøll ella rógva um firðir og sund, men veðrið er tað sama og arbeiðsumstøðurnar stundum ruskutar. Harafturat hava føroyingar ikki somu starvsmannasiðvenjur sum danir. So eftir at postverkið varð yvirtikið, broyttist búnin so líðandi og gjørdist meira lagaligur og gerandisligur.

Fyrstu føroysku búnarnir vóru ein svartur vindjakki og svartar buksur. Hettar hevur við tíðini ment seg til núverandi postbúnan, ein azurbláur vindjakki við myrkabláum ermum við endurskinsbondum og búmerkinum hjá Posta á bróstinum. Buksurnar eru svartar arbeiðsbuksur við stórum síðulummum og endurskinsbondum á legginum. Undir jakkanum bera postboðini antin ein azurbláan "fleece" jakka, sum eisini kann brúkast sum vanligur jakki á sumri - ella myrkabláa troyggju við búmerki á bróstinum.

**Skitsan hjá Slania**

Sama ár sum føroyska deildin av Post Danmark gjørdist Postverk Føroya, vórðu fyrstu føroysku frímerkini útgivin. Myndevnini vóru: Merkið, ein føroyskur árabátur í neysti




*1. april 1976. Løgmaður Atli P. Dam til vinstru. Hinir báðir eru B.M. Andersen og Esbern Midjord*

og ein postmaður úr gomlum døgum. Triðja frímerkið uttast til høgru á smáarkinum er ein skitsa, sum meistaragravørurin CZ Slania teknaði í skundi av árabátinum í neysti.

Í marguni stendur á donskum: "Hofgravør CZ Slanias forslag til inskriptionens placering." Slania graveraði øll frímerkini tað árið.

**Gamalt postskelti úr Havn**

Niðast í høgra horni á arkinum sæst eitt gamalt og slitið postskelti úr Havn. Vit lata tað standa sum ein varði úr føroysku postsøguni – tært av tíðarinnar tonn, veðurbart og fult av góðum frásagnum.

*Anker Eli Petersen*




*Gamalt postkelti á posthúsinum í Havn*







Royndarprent

# Gróðursettur - *tilflytarasøgur*

Sum oyggjaland hava Føroyar eina langa søgu, har fólk bæði eru flutt til Føroya og av landinum. Sjálvt føroyingar, væl rótfestir í Føroyum, hava forfedrar, sum komu úr øðrum londum t.d. úr Noregi, Danmark, Skotlandi og Írlandi. Tað at flyta heimanífrá og at búseta seg aðrastaðni, er nakað, sum øll menniskju kenna til. Hetta er tað, sum myndahøggarin Joel Cole – ein føroyskur amerikumaður - heiðrar í hesi frímerkjarøð.

Cole, føddur í 1968, kom til Føroya úr USA fyri fyrstu ferð í 1986 sum skiftisnæmingur í eitt ár. Hereftir vitjaði hann í Føroyum á hvørjum ári fram til 2011, tá hann flutti til Føroya. Hann býr nú í Saltnesi saman við føroysku konu sínari. Hann eigur fimm børn, øll hava føroyskar røtur.

Í hesi røðini við seks frímerkjum heiðrar Cole sjálva upplivingina av at flyta, bæði sum eitt alheimsligt fyribrigdi í søgu menn-iskjans, men eisini grundað á sína egnu persónligu søgu. Tá hann arbeiðir við træi, sum er felt í hansara heimstáti, Minnesota, brúkar Cole orð og vendingar, sum verða brúktar innan skógrøkt, tá hann sipar til gongdina í tilflytingini: at takast upp við rót, at umplantast, at formast, at følna, at vaksa, at trívast og at blóma.

Øll ferðin, heilt frá skelkinum av at siga far-væl til tað kenda og til at festa røtur í nýggjari mold, verður víst í hesi røðini, nevnd “Transplanted” og sum er sett saman av 50 skurðmyndum íalt. Tær seks skurðmyndirnar, sum eru valdar út til frí-merki eru hesar: Torn, Casual Alien, Round my Edges, In my Fathers Footsteps, Floral Fireworks og Full Circle. Hvør einstøk skurðmynd stendur fyri einum ávísum skeiði í tilgongdini frá at vera fremmandur og til at gerast borgari. Hvør einstøk skurðmynd hevur partar bæði úr heimlandinum hjá Cole og úr hansara ættleidda heimlandi.

Sjálv tilgongdin, tá hann heystar uppruna-tilfarið, hevur týdning fyri verkini hjá Cole.



*Listamaðurin Joel Cole í verkstaðnum. Mynd: Finnur Justinussen*

Hann vaks upp ikki langt frá Missisippiánni í býnum Shakopee, ið hevur fingið navn sítt eftir eini grein av Dakota-ættarbólkinum. Tætt við bratta áarbakkan veksur mongd av gomlum leyvtrøum, m.a. sukurahorn og valnøtutrø. Har finnur hann við, t.d. trø, sum eru brotnað ella eru í endanum av teirra livitíð. Hesi brúkar hann sum tilfar til verkini hjá sær. Í hesi røðini hevur hann eisini brúkt rátt, skorið og pussað føroyskt basalt – eitt steinslag, ið er eitt av høvuðstilfarinum, sum hesar oyggjar í Atlantshavi eru gjørdar av. Hvør skurðmynd stendur á einum støði av hesum gamla tilfari.

Fyri tað mesta er tað sukurahorn, sum hann evnar til. Tað er tætt við fínligum árringum og verður eisini rópt steinahorn. Hetta træið, sum hoyrir til upprunavøksturin í Minnesota, hevur fingið navn sítt – sukurahorn – tí tað framleiðir eina rúgva av søtari plantusevju, sum kann kókast niður til ahornsirop. Hetta var vælkent millum fólkini í Dakota-ættarbólkinum, sum búgva í økinum í dag og sum búðu har í fleiri túsund ár áðrenn tilflytararnir úr Evropa komu.

Fyri Cole gevur hesin viðurin afturljóð í hansara egnu søgu. Hann hevur eisini ferðast langt heimanífrá og er eisini ógvusliga umskapaður av ferðini. Rørdur av síni egnu uppliving sum tilflytari og sínum takksemi fyri ta gávu, ið hansara ættleidda land hevur givið honum, hevur Cole skapt hesa røðina av skurðmyndum fyri at fagna umplantingini og gróðursetanini, ævintýrinum og spenninginum, sakninum, umskapanini og gleðini við at laga seg til og ættleiða eitt nýtt heimland.

Føroyar hava heimsins mest líku íbúgvar. Teir uml. 50.000 íbúgvarnir eru nærum allir av skandinaviskum ella skotskum / írskum uppruna. Tí kann man undrast yvir at í lítla bólkinum av tilflytarum í Føroyum, eru umleið 100 ymiskar tjóðir umboðaðar.



*Tvær skurðmyndir: Round my Edges og Full Circle. Myndir: Finnur Justinussen*

Tá hann gjørdi undankanningar til hesa verkætlan, tosaði Cole við fleiri enn 50 tilflytarar í Føroyum. Hann savnaði saman teirra hugsanir og legði tær afturat sínum egnu upplivingum av, hvussu tað var at laga seg til eitt lív so langt burturi frá uppruna-liga heimstaðnum. Hesi evni, sum komu fram í samrøðum, vóru við til at evna hugskotið aftanfyri hvørja einstaka skurðmynd.

Verkini hjá Cole eru tíðarkrevjandi og eru úrslit av eini langari hugsunartilgongd umframt kropsligum arbeiði. "Evnini koma av sær sjálvum, tá eg hyggi at tí tilfari, sum eg havi framman fyri mær," sigur Cole, sum sær seg sjálvan sum ein abstraktan intuitivan listamann. "Formar endurtaka seg og koma við hugskotum og tilsipingum til hvørjar lutir, sum tey kunnu evnast til. Eg taki ímóti hesum sniðfundigu uppskotum og grundi yvir tey í fleiri vikur. Tá eitt hugskot so smátt fer at taka skap, so bindi eg meg til at fáa júst tað fram í tilfarinum."

Sum ein tilflytari, sum er fallin væl til í einum nýggjum heimlandi, so havi eg fingið nágreiniligt innlit í tær royndir og trongdir, sum fólk uppliva, tá tey velja at flyta úr sínum heimlandi," sigur Cole. "Eg kann eisini hava samhuga við teimum, sum fara ígjøgnum hesa tilgongd ímóti sínum vilja, tvingað at flýggja orsakað av kríggi, fátækradømi, hungri og harðskapi."

"Eftir at hava búð í Føroyum í nærum tíggju ár, so eri eg takksamur fyri mína familju, mínar vinir, mítt arbeiði sum lærari og listafólk og sum heild við mína støðu í samfelagnum", sigur hann. " Hetta takksemi hevur fingið meg at hugsa um hesa tilgongd, sum eg havi verið í og tað er íblásturin til hesa røðina.

*Chris Welsh*










Royndarprent

# Hattarvík og Kirkja -
# *tvey andlit av somu oyggj*

Fugloy er Føroya eystasta oyggj, men í mun til hinar føroysku útoyggjarnar er hon býtt millum tvær bygdir við heilt ymiskum samleikum. Báðar bygdir eru helst fyrndargamlar, men meðan Hattarvík helst er upprunanavn á bygdini, er navnið Kirkja nýggjari. Upprunaliga navnið hevur møguliga verið Kirkjubøstaður ella Kirkjubólstaður, og Hundabrævið umtalar bygdina sum Bø. Ilt er at vita, hvussu ognarviðurskiftini hava verið í eldri tíðum, men í nútíðini hevur Hattarvík 27 merkur, har av 23½ kongs og 3½ ogn, meðan Kirkja hevur 20 merkur, har av 3 kongs og 17 ogn. Hattarvík er sostatt kongsbygd, meðan Kirkja er ognarbygd. Uttan iva hevur hetta ávirkað fólkasálina í bygdunum báðum.

Lendisliga eru bygdirnar púra ymiskar. Hattarvík liggur rundleidd kring eina vík. Kirkja liggur hinvegin strekt út eftir eini líð. Hattarvík liggur huld millum fjøll og sæst ikki frá aðrari bygd. Meginparturin av Hattarvík sær beint út á hav, tó at nøkur hús síggja á Eysturhøvda á Svínoynni. Kirkja liggur opin fyri á suðurendanum á oynni. Frá øllum húsum í bygdini síggjast stórbæru Svínoy, Borðoy og Viðoy. Fá støð í landinum hava fagrari útsýni og betri sólargang enn Kirkja, og tí er bygdin eisini vorðin sera væl umtókt sum frítíðarøki.

Út frá einum jarðfrøðiligum sjónarmiði er Fugloyar-Svínoyarsyllin áhugaverdasti partur av oynni. Hendan syll er kvett í tvey og ber boð um, at oyggjarnar áður hava verið ein. Siglir tú framvið Selnesi, sæst hendan syll týðiliga í berginum, eins og hon sæst aftur í berginum millum Kirkju og Hattarvík. Omanfyri Hattarvík er syllin serliga sjónlig, og hevur har fingið forkunnuga navnið Gullheyggur.



*Hattarvík. Eystfelli til høgru á myndini. Mynd: Fotostudio*

Undir Gullheyggi sigst lindormur bøla á gullríkidømi, gandaður av kellingini Steinvør. Ormurin hvílir høvur sítt á Øskudunga skamt frá Kellingará. Henda søgn stavar frá døgum Haralds Hárfagra, men øldir seinni er Hattarvík kend fyri floksmenninar, ið tóku valdið í Fugloy og síðani royndu at leggja Føroyar undir seg. Kendu orðini "Frítt er Eystfelli frá at fara…" vórðu søgd av Sjúrði við Kellingará. Í 17. øld er Hattarvík kend fyri hetjuna og stórmannin Jústinus og son hansara Jógvan, ið gjørdist løgmaður í 1629. Fugloyarbók – kvæðasavn við 97 kvæðum – varð eisini skrivað av Hanusi bónda á Kellingargarði tíðliga í 19. øld.

Hattarvíkingar hava verið gávuríkir í fornum tíðum.

Samanborið við Hattarvík kann Kirkja mest erpa sær av trøllum og huldufólki, oftast duld undir túgvum og heyggjum. Stórur partur av søguliga lendinum á Kirkju er tó rapað í havið, tí bygdin er so ábær. Ólukkudag veturin 1818 mundi havið gjørt enda á Kirkju, tá seks kirkjumenn lótu lív í bátsvanlukku. Hesa hending hevði gandmáttugi Fimti í Hattarvík spátt árið fyri. Mundi tað vera fjørutrøllið, ið Fimti áður hevði verið í hóslag við?

Eftir hetta hevði Kirkja nærum ongar arbeiðsførar menn, og bygdin stóð fyri hóttafalli. Bygdin spældi stutt eftir av við kirkjuna, ið helst hevði staðið á sama staði síðani fyrndartíð. Kirkjan varð í 1833 flutt til Hattarvíkar.

Tó tíðirnar vendu. Hattarvík – bygdin við størra markatalinum – hekk føst í siðbundna samfelagnum, meðan Kirkja komandi øldina upplivdi eina framúr menning og gjørdist nógv hin størra bygdin. Menn fluttu úr



Royndarprent

*Kirkja. Eysturhøvdi á Svínoynni í baksýni. Mynd: Fotostudio*

øðrum bygdum – eisini úr Hattarvík – og fyltu tómrúmini á Kirkju. Í 1925 búðu heili 148 fólk á Kirkju - tað mesta nakrantíð, og í 1933 fekk bygdin aftur nýggja kirkju á sama staði, har gomlu kirkjurnar høvdu staðið. Í nýggjari tíð hevur tað eisini verið Kirkja, ið fostraði stór skøld og politikarar. Hon fekk eisini skúla í 1888, meðan Hattarvík ikki fekk sín skúla fyrr enn í 1925.

Í dag er Kirkja høvuðsbygdin í Fugloy. Har búgva fleiri fólk, og nakað av nýbygging er. Eisini almennu funktiónirnar eru í høvuðsheitum staðsettar á Kirkju. Bygdin hevur munandi meiri dagførda lending og tyrlupall, ið lýkur øll krøv. Bygdin hevur elframleiðslu, handil, skúla, matstovu og bygdaráðshús.

Skúlin í Hattarvík brendi hinvegin niður fyri nøkrum árum síðani, men er síðani bygdur upp aftur og virkar í dag sum felagshøli og alment vesi. Hattarvík hevur eisini bygt upp ferðavinnuvirksemi seinastu árini, ið byggir á staðbundna matvøruframleiðslu og forna siðsøgu. Sostatt kann tað siðbundna eisini gerast eitt aktiv í tí modernaða.

Hóast ríku søguna sær framtíðin ikki bjørt út hjá hvørki Hattarvík ella Kirkju.

Gjøgnum seinnu helvt av 20. øld hava bygdirnar ikki megnað modernaðu kapprenningina, og eru spakuliga minkaðar í fólkatali. Uttan fast samband gerast báðar bygdir at kalla frítíðarbygdir um nøkur áratíggju.

*Sámal Matras Kristiansen, sept. 2020*










Royndarprent

# Eysturoyartunnilin

**Ein landsvegur undir havsins botni**
21. februar 2017, trýsti Henrik Old, landstýrismaður, á knøttin, ið loysti fyrsta skotið í størstu tunnilsverkætlan nakrantíð í Føroyum. Hetta var á Strondum – og í fyrsta umfari varð ein 1,7 kilometra langur tunnil boraður og sprongdur undir havbotnin og út móti einum fastapunkti undir Saltnesgrynnuni í Skálafjarðarmunnanum.

Stutt eftir, tann 27. apríl 2017, byrjaði arbeiðið at bora ein 7,5 km langan tunnil av Hvítanesi, Streymoyarmegin. Hesin tunnil hevði kós móti sama fastapunkti undir Saltnesgrynnuni sum tann av Strondum.

**Rundkoyringin undir havsins botni**
Tann 11. desember 2017, kom tunnilstoymið av Strondum fram til fastapunktið undir Saltnesgrynnuni, har, so løgið tað ljóðar, ein undirsjóvarrundkoyring skuldi liggja. Orsøkin til hetta, milt sagt løgna fyribrigdið er tann, at Eysturoyarmegin skuldu tveir tunnilsmunnar vera, ein á Strondum og hin í Saltnesi við Runavík. Ringleidda rundkoyringin varð nú borað kring fastapunktið, við einari grótsúlu í miðjuni.

Síðan vóru tvær nýggjar verkætlanir settar í verk. Eitt arbeiðstoymi fór undir at bora og spreingja ein 2,2 km langan tunnil niðan til Saltnesmunnan, meðan aðrir boraðu og sprongdu fyri sær suðureftir móti verandi boring av Hvítanesi.

**At finnast undir havsins botni**
7. juni 2019 bar saman millum boritoymini frá Streymoynni og Eysturoynni undir havbotninum millum oyggjarnar. Tá dustið av seinastu spreingingini hevði lagt seg, høvdu teir borað ein undirsjóvartunnil við trimum munnum, har høvuðstunnilin er 11.250 metrar langur. Av trygdarorsøkum er mesta hallið í tunlinum 5%. Hægsta punktið er 15 metrar omanfyri sjóvarmálan og lægsta punktið 187m undir havfløtuni.

Tá bori- og spreingiarbeiðið var liðugt, fór arbeiðið upp á koyribreytir og trygging av tunlinum annars í gongd. Samstundis sum



*Tunnilismunnin við Saltnes. Foto: Faroephoto*

tunnilin varð boraður, varð umfatandi vegagerð gjørd við tunnilsmunnarnar.

**Endamálið við tunlinum**
Í mun til hinar báðar undirsjóvartunlarnar, Vágatunnilin og Norðoyatunnilin, er Eysturoyartunnilin ikki bygdur fyri at avloysa eina ferjurutu. Har var frammanundan vegasamband til Havnar um tunnilin við Norðskála, brúnna við Streymin og Kaldbakstunnilin. Men gamla farleiðin var long og trupul í støðum, serliga um veturin og í ringum veðri.

Endamálið við nýggja undirsjóvartunlinum er at sleppa undan hesi farleið og stytta um leiðina millum Skálafjørðinum og Havnina - ein munandi lætti bæði fyri farmaflutningin yvir land og hjá fólki, ið koyra til Havnar til arbeiðis hvønn dag.

**Styttri farleið, ferðslutrygd og minni útlát**
Frá tunnilsmunnunum í ávíkavíst Runavík og á Strondum eru 55 kilometrar til Havnar eftir gomlu farleiðini, t.v.s. ein túrur upp á uml. 55 minuttir í bili. Við nýggja tunlinum er leiðin stytt til 17 km og tíðin stytt til 16 minuttir. Millum Havnina og Klaksvík er gamla leiðin 73 kilometrar og koyritíðin er uml. 68 minuttir. Við nýggja tunlinum er leiðin 35 km og koyritíðin uml. 41 minuttir.

Hettar fer at lætta munandi um hjá flutningsídnaðinum og vanligum koyrandi fólki, bæði tá talan er um koyritíð og ferðslutrygd. Stytti teinurin ber annars eisini minni $CO_2$ útlát við sær, so grundgevingarnar fyri Eysturoyartunilin eru sterkar.

**Undirsjóvarlist**
Sum nevnt frammanundan, so er ein rundkoyring í tunlinum undir Saltnesgrynnuni. Mitt í rundkoyringini stendur ein yvirvaksin basaltsúla.

Fyri at fríðka um tunnilin, hevur listamaðurin, Tróndur Patursson, gjørt ein dansiring úr stáli. Dansandi fólk, upplýst aftanífrá við marglittum ljósi, sum koma at leggja dansandi skuggar á súluna aftanfyri, tá ljósið frá bilunum ber við tey.

Ein kend ørindisregla ljóðar soleiðis: "Ongin treður dansin undir moldum," men undir havsins botni er onki óført.

*Anker Eli Petersen*




Test proof




# Andrea Árting

## Havnar Arbeiðskvinnufelag 85 ár - 1936-2021

Ein tunn eldri dama í hatti og frakka, sum brosaði fryntliga og heilsaði, tá man hitti hana í býnum. Soleiðis minnist eg Andreu Árting, ein av fremstu framherjum í føroyskari arbeiðararørslu yvirhøvur.

Ein kvinna við avgjørdum meiningum um sosial viðurskifti, og sum ikki himpraðist at siga valdinum beint ímóti.

**Ein lítil gøla og ein góð familja**
Andrea Árting varð fødd í Havn tann 23. desember 1891. Pápin var Jacob Johansen (1860-1900), blaðstjóri á Dimmalætting - og mamman, Súsanna Rasmussen (1873-1940). Hetta var ein lítil gøla í Havnini tá á døgum. 31 ára gamli blaðstjórin var ikki giftur við 18 ára gomlu mammuni – hann fór úr Føroyum stutt eftir og kom ikki aftur.

Lítla Andrea kom til mostur sína, Trinu, at vera. Hon var gift við gitna bátasmiðinum, Elias Johansen, vanliga róptur Elias í Rættará, og vaks upp saman við børnum teirra. Trina doyði ung, Elias giftist upp aftur og fekk fleiri børn.

**Sosialistur og arbeiðsgevari**
Andrea treivst við stóru familjuni og serliga við fosturpápanum. Elias í Rættará var virkin politiskt og mentanarliga - og ikki sørt av einum paradoksi í samtíðini. Hóast hann var arbeiðsgevari og hevði fólk í arbeiði, hevði hann sosialistiskar hugsjónir og vinstrahall sjónarmið. Ongin ivi er um, at Elias ávirkaði politiska ástøðið hjá Andreu og vakti hennara sosialu tilvitsku og rættvísiskenslu. Har vað nógv lisið í heiminum um politik og samfelagsviðurskifti annars.

**Fiskur og tuberklar**
14 ára gomul fór Andrea úr skúlanum. Hon var gløgg og evnarík og lærararnir mæltu til at hon fekk eina læraraútbúgving. Men ráðini vóru ikki til tess, so hon fór í fiskin at arbeiða, sum gentur flest. 17 ára gomul varð Andrea rakt av herviligastu pláguni við fyrra aldarmótið – hon fekk tuberklar og var næstan tvey ár á Sanatoriinum.



*Andrea Árting. Foto: Kalmar Lindenskov*

**Tænastugenta í Keypmannahavn**
Tá uppihaldið í Hoydølum var av, fór Andrea til Danmarkar, har hon komandi seks árini abeiddi sum tænastugenta í Keypmannahavn. Hesa tíðina stríddust danskar kvinnur fyri borgarligum og politiskum javnrætti – og tá Andrea í 1917 kom heim aftur til Føroyarog Havnar, var hon ávirkað og hugkveikt av danska kvinnustríðnum. Hon var sannførd um, at kvinnur kundu tað sama sum menn – og hon vildi gera okkurt við afturhaldið hjá føroysku kvinnunum. Allarhelst var tað hettar ið fekk hana til at skipa fyri kvinnukappróðri á Ólavsøku í 1918 - ein siður ið hevur hildið sær líka síðan.

**Skiparafrúa og yrkjari**
Í 1922 giftist Andrea við Jóhannes Árting av Toftum, sum hon hevði hitt nøkur ár frammanundan. Jóhannes var skipari, sigldi við føroyskum og útlendskum skipum og var ofta burtur. Saman fingu tey fýra børn og Andrea gekk heima fyri at taka sær av børnunum. Hesa tíðina var hon virkin í tjóðskaparrørsluni. Sum fólk flest tá á døgum, hevði Andrea bara lært at skriva á donskum.

Nú lærdi hon seg at skriva føroyskt og m.a. skrivaði hon yrkingar. Kendasta yrking hennara er, "Dunandi aldan mót klettunum brúsar," sum hon sjálv eisini gjørdi lag til.

**Lagnan bankar á dyrnar**
Andrea hevði nú sítt uppi á turrum. Hon var í fýratiárunum, gott gift við einum skipara, heimagangandi og millum tey frægast stillaðu í Havn. Men hon kundi ikki skjóta loku fyri veruleikanum rundan um seg – og veruleikin var ikki mjúkur at strúka akkurát tá.

Heimsumfatandi fíggjarkreppan í tríati árunum rakti eisini Føroyar sum ein sleggja. Útflutningurin av fiski svann burtur í lítið og onki og tíðin var merkt av stórum arbeiðsloysi og sosialari neyð.

Í Havn var arbeiðsloysið næstan 70%. Lønirnar vóru lágar og fakfeløgini undir høgum trýsti. Ringast av øllum vóru kvinnurnar

løntar. Meðan arbeiðsmenn fingu eina krónu um tíman og arbeiðsdagurin var 8 tímar, fingu arbeiðskvinnur bara 30 oyru um tíman og arbeiddu 12 tímar um dagin – tað vil siga hálva samdøgrið fyri lítið og lætt.

Arbeiðsloysistrygging fanst ikki tá, og ongin vilji var í Løgtinginum at gera nakað við tað.

Í 1936 tóku kvinnur í Havn seg saman og stovnaðu Havnar Arbeiðskvinnufelag í einari roynd at bøta um ringu støðuna og arbeiðsviðurskiftini. Men tað gekk sum ein kundi vænta. Arbeiðsgevararnir løgdu trýst á nevnd og forkvinnu, og brátt stóðu tær í einari støðu, at tær ikki bara kundi missa arbeiðið, men eisini rættin at keypa upp á borg.

Fleiri av teimum vóru eisini giftar við fiskiella arbeiðsmonnum við sama arbeiðsgevara og óttaðust avleiðingar fyri hjúnarfelagan eisini. Einasta vón hjá illa stadda fakfelagnum var at royna at finna eina óhefta kvinnu at standa á odda fyri felagnum, sum tordi at standa við síni krøv og meiningar – og sum ikki kundi leggjast undir trýst.

Og so ein dag í 1937 bankaði á dyrnar hjá Andreu Árting.

Uttan himpr ella fyrivarni, játtaði Andrea at átaka sær starvið sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Hóast hon hevði sítt uppi á turrum, kendi hon væl til vesælu korini og strævna gerandislívið hjá verkakvinnuni – hon kom sjálv úr sama umhvørvi.

Ein ella fleiri arbeiðsgevarar hava helst suffa tungan, tá tað morgunin eftir frættist í býnum, hvør nú stóð á odda fyri arbeiðskvinnunum í Havn.

**Ein stutt prosess**

Elddópurin hjá Andreu sum fakfelagsforkvinna, kom árið eftir við lønarsamráðingunum við arbeiðsgevararnar og gjørdist ein stutt prosess. So at siga hvør einasta kvinna í fiskiídnaðinum í Havn hevði nú meldað seg inn í fakfelagið. Kvinnurnar gjørdu vart við, at tær vildu samráðast um betri løn og styttri arbeiðsdag, men arbeiðsgevararnir noktaðu. Andrea og kvinnurnar boðaðu so frá verkfalli og gjørdu greitt fyri einstøku arbeiðsplássunum, at ongin fór a koma til arbeiðis dagin eftir. Semingsmaðurin varð tilkallaður og samráðingarnar byrjaðu.

Tá arbeiðsgevararnir undirbjóðaðu, herdu kvinnurnar, sambært Andreu sjálvari, krøvini. Stutt eftir gingu arbeiðsgevarnir við upp á at seta tímalønina upp, úr 30 til 40 oyru og tímatalið frá 12 til 11 tímar um dagin

**Somu løn fyri sama arbeiði**

Tað er frá hesari tíðini í tríatiárunum at vit finna fyrstu útalilsini frá Andreu Árting um somu løn fyri sama arbeiði. Hóast kvinnurnar høvdu vunnið sín fyrsta sigur, var langt upp á støðið hjá monnunum. Teirra tímaløn var dupult so høg og arbeiðsdagurin tríggjar tímar styttri - og korini hjá arbeiðsmonnum vóru snøgt sagt ikki tespulig. 40 ár skuldu ganga til líka løn gjørdist veruleiki – og tá var Andrea Árting enn forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag.

**Kríggið og fakfelagsarbeiði**

Í byrjanini av seinna heimsbardaga, vórðu Føroyar, sum kunnugt, hertiknar av bretska hervaldinum. Hersetingin varð treytaleyst góðtikin av føroyingum. Men herseting og kríggj yvirhøvur gjørdu lív og virki tvørligari hjá verkamannastættini og fakfeløgum. Arbeiði var til flestu hendur, men dýrtíð og brátt vørutrot trýstu prísirnar upp og gjørdi tað tvørligt hjá verkafjøldini at fáa endarnar



*Á ólavsøku 1918. Við róðri situr Andrea Árting*

at røkka saman. Fakfeløgini kundu ikki nýta verkfalsrættin, eftirsum verkfall var bannað í undantaksstøðuni.

Undir hesum truplu umstøðunum vísti Andrea Árting sítt íborna sosialpolitska snildi. Hon vísti tíðliga á møguleikan fyri prístalsjavning fyri at standa ímóti vinningsbrellinum undir krígnum. Uppskotið rein ikki við hjá politikarunum. Seinni vóru tó royndir gjørdar at steðga príshækkingunum, men til fánýtis.

Hon stríddist fyri at skaffa bíligari kol til húsarhaldini kring landið – at skaffa meira mjólk til barnafamiljur – og klæðir og skógvar til tey børn ið vóru ringast fyri. Tað ein ikki kann fremja í tí stóra, kann vinnast aftur í tí smáa.

Í 1943 legði javnaðarflokkurin hjartamálið hjá Andreu Árting, somu løn fyri sama arbeiði, fram í løgtinginum. Uppskotið varð felt við aðalundanførsluni, at hettar var eitt mál fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**Kreppan í fimtiárunum og kelduskattur**

Hugdjarva viðgongutíðin eftir kríggið, fekk bráðan enda í 1949. Íløgurnar í útslitnar guvutrolarar úr Stórabretlandi vístu seg at vera eitt óbøtiligt glappakast hesa tíðina, tá prísurin á koli brádliga hækkaði í stórum.

Sjóvinnubankin, ið hevði fíggjað partar av ævintýrinum, fór av knóranum – og enn einaferð sakk samfelagið til kníggja. Arbeiðsloysi gjørdi aftur um seg í stórum og fólk vóru noydd frá húsi og heimi. Mong fluttu enntá av landinum og komu ongantíð aftur.

Upp gjøgnum fimtiárini var Havnar Arbeiðskvinnufelag partur av fleiri fakligum stríðsmálum. Men verkfallskassin var tómur og mótstøðan sterk. Tó stuðlaðu kvinnurnar

fiskimonnunum treytaleyst í stóra fiskimanna-verkfallinum í 1954. Órógvað av fíggjar-viðurskiftunum hjá limunum, legði Andrea Árting hesa tíðina eitt víðgongt uppskot fram um kelduskatt – samtíðarskatt, sum skuldi hjálpa vanligum fólki undan tí fíggjar-ligu eftirstøðu, ið plágaði manga familju. Uppskotið fekk ikki politiska undirtøku – men enn einferð vísti Andrea sítt framskygni. Kelduskattur varð ikki settur í verk fyrr enn í áttatiárunum.

**The Grand Old Lady**

Í seksti- og sjeytiárunum var Andrea "The Grand old Lady" í fakfelagshøpi. Hon var, umframt forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnu-felag, eisini nevndarlimur í Føroya arbeiða-rafelag. Hesa tíðina kom tað meira enn so fyri, at man stóð á onkrum 1. maidagshaldi og hálvskammaðist yvir, at gamla konan á røðarapallinum var reyðari enn ein sjálvur.

**Somu løn fyri sama arbeiði – umsíðir!**

Í arbeiðsmarknaðarsamráðingunum í 1977 varð lívslangi dreymurin hjá Andreu Árting endiliga uppfyltur. Undir beinhørðum sam-ráðingum við tá 85 ára gamla framherjanum á odda, gingu arbeiðsgevararnir umsíðir við til kravið um, at kvinnur skuldu fáa somu løn sum menn fyri sama arbeiði. Broytingin varð stigvíst sett í verk í árunum fram til 1981.

Á aðalfundi í Havnar Arbeiðskvinnufelag, seinni í 77, segði Andrea Árting forkvinnu-sessin frá sær – eftir trúgva tænastu í 40 ár. Limirnir sýndu henni takksemi við at sam-tykkja, at hon skuldi fáa fulla løn frá felag-num restina av ævini.

Andrea Árting doyði tann 30. mai 1988. Eftir hvat skilst, fylgdi hon áhugað við í sam-felagskjakinum til sín doyggjandi dag.

*"Eg vil her loyva mær persónliga at viðmerkja, at eg, sum barn av arbeiðarastættini í Havn upp gjøgnum sekstiárini, sjáldan havi kent størri heiður og gleði við at gera eitt frímerki, enn hesa væl uppibornu kvøðu til eina ta mest sermerktu og framskygdu kvinnu, ið Føroyar nakrantíð hava fostrað."*

Frímerkið av Andreu Árting kemur út sjálvan kvinnudagin 8. mars 2021.

*Anker Eli Petersen*



*Andrea Árting á røðarapallinum, helst til eitt 1. mai dagshald.*
*Foto: Kalmar Lindenskov*

# Nýggjar útgávur tann 7. januar, 19. februar og 8. mars 2021



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postsøgan í 150 ár** |
| Útgávudagur: | 07.01.2021 |
| Virði: | 3 x 17,00 kr |
| Nummar: | FO 942-944 |
| Stødd, frímerki: | 21 x 28 mm |
| Stødd, smáark: | 105 x 70 mm |
| Listafólk: | Kári við Rættará |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja 0-100 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Gróðursettur - tilflytarasøgur** |
| Útgávudagur: | 19.02.2021 |
| Virði: | 3 x 5,00 og 3 x 17,00 kr. |
| Nummar: | FO 945-950 |
| Stødd, frímerki: | 28 x 42 mm |
| Stødd, smáark: | 106 x 112 mm |
| Sniðgeving: | Joel Cole |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing |
| Postgjaldsbólkur: | Ískoytisvirði og smábrøv innanoyggja 0-100 gr |





Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Kirkja og Hattarvík** |
| Útgávudagur: | 19.02.2021 |
| Virði: | 17 og 27 kr. |
| Nummar: | FO 951-952 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 30 mm |
| Myndir: | Fotostudio |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til útheimin 0-100 g<br>+ sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum |





Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Eysturoyartunnilin** |
| Útgávudagur: | 19.02.2021 |
| Virði: | 10,00 og 17,00 kr |
| Nummar: | FO 953-954 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 26 mm |
| Listafólk/mynd: | Tróndur Paturson og Faroephoto |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Ískoytisvirði og smábrøv innanoyggja 0-100 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Andrea Árting** |
| Útgávudagur: | 08.03.2021 |
| Virði: | 39, 00 kr |
| Nummar: | FO 955 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Listafólk: | Anker Eli Petersen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Brævpakkar innanoyggja upp til 500 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Kirkja. Myndatøka: Fotostudio . Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark


Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


ISSN 1603-0036

/faroestamps

# Nýggjar plakatir







## Tvær av vøkru skurðmyndunum hjá Joel Cole sum plakat

Posta hevur gjørt tvær vakrar plakatir við myndevnum frá smáarkinum "Gróðursettur - tilflytarasøgur"

Plakatirnar eru prentaðar á góðskupappír og eru 297 x 420 mm (A3) til støddar.

Prísur: 150,- DKK fyri hvørja.

Posta
FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi - Posta Stamps nr. 46

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 07.01.2021 - Postsøgan 150 ár - FO 942-944 (smáark við trimum frímerkjum)** | | | | | | |
| PPS000121 | Postsøgan 150 ár, smáark óst. | * | 51,00 | 7,15 | | |
| FFT000121 | Postsøgan 150 ár, smáark st. | ☉ | 51,00 | 7,15 | | |
| DDT000121 | Postsøgan 150 ár, smáark dgst. | ☉ | 51,00 | 7,15 | | |
| FFU000121 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 56,00 | 7,85 | | |
| **Útgáva 19.02.2021 - Gróðursettur** *tilflytarasøgur* **- FO 945-950 (smáark við 6 frímerkjum)** | | | | | | |
| PPS000221 | Gróðursettur, smáark óst. | * | 66,00 | 9,25 | | |
| FFT000221 | Gróðursettur, smáark st. | ☉ | 66,00 | 9,25 | | |
| DDT000221 | Gróðursettur, smáark dgst. | ☉ | 66,00 | 9,25 | | |
| FFU000221 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 71,00 | 9,95 | | |
| **Útgáva 19.02.2021 - Kirkja og Hattarvík - FO 951-952 (2 frímerki)** | | | | | | |
| PPA010221 | Kirkja og Hattarvík, røð óst. | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FFG010221 | Kirkja og Hattarvík, røð fdst. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| DDG010221 | Kirkja og Hattarvík, dgst. | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| PPN000221 | Frímerkjahefti, óst. | * | 122,00 | 17,00 | | |
| FFO000221 | Frímerkjahefti, fdst. | ☉ | 122,00 | 17,00 | | |
| DDO000221 | Frímerkjahefti, dgst | ☉ | 122,00 | 17,00 | | |
| PPJ000221 | Postkort (2) | * | 14,00 | 1,95 | | |
| FFJ000221 | Maksimumkort (2) | ☉ | 58,00 | 8,10 | | |
| FFK010221 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 49,00 | 6,85 | | |
| FFL010221 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 51,00 | 7,15 | | |
| FFM010221 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 183,00 | 25,60 | | |
| FFP000221 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ☉ | 127,00 | 17,75 | | |
| PPB010221 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 176,00 | 24,65 | | |
| PPC010221 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 176,00 | 24,65 | | |
| PPD000951 | Kirkja og Hattarvík, ark 17KR (20) | * | 340,00 | 47,50 | | |
| PPD000952 | Kirkja og Hattarvík, ark 27KR (20) | * | 540,00 | 75,50 | | |
| **Útgáva 19.01.2021 - Eysturoyartunnilin - FO 953-954 (2 frímerki)** | | | | | | |
| PPA020221 | Eysturoyartunnilin, røð óst. | * | 27,00 | 3,80 | | |
| FFG020221 | Eysturoyartunnilin, røð fdst. | ☉ | 27,00 | 3,80 | | |
| DDG020221 | Eysturoyartunnilin, dgst. | ☉ | 27,00 | 3,80 | | |
| FFK020221 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 32,00 | 4,45 | | |
| FFL020221 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 34,00 | 4,75 | | |
| FFM020221 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 115,00 | 16,00 | | |

* = óstemplað, ☉= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PPB020221 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 108,00 | 15,10 | | |
| PPC020221 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 108,00 | 15,10 | | |
| PPD000953 | Eysturoyartunnilin, ark 10KR (20) | * | 200,00 | 28,00 | | |
| PPD000954 | Eystroyartunnilin, ark 17KR (20) | * | 340,00 | 47,50 | | |

**Útgáva 08.03.2021 - Andrea Árting - FO 955 (1 frímerki)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PPA000955 | Andrea Árting, røð óst. | * | 39,00 | 5,45 | | |
| FFG000955 | Andrea Árting, røð fdst. | ☉ | 39,00 | 5,45 | | |
| DDG000955 | Andrea Árting, dgst. | ☉ | 39,00 | 5,45 | | |
| FFK000955 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| FFL000955 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| FFM000955 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 161,00 | 23,00 | | |
| PPB000955 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 156,00 | 21,10 | | |
| PPC000955 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 156,00 | 21,10 | | |
| PPD000955 | Andrea Árting, ark (20) | * | 780,00 | 109,00 | | |

**Ymiskt**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| WPPE02020 | Árbók 2020 | * | 520,00 | 72,80 | | |
| PPY002020 | Ársmappa 2020 | * | 491,00 | 68,75 | | |
| PPX002020 | Jólamerkini 2020 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WJOJ02020 | Jólakort (3 dupult v/bj.) | * | 25,00 | 3,50 | | |
| WJOLBOK20 | Bók: ”Fyrstu jólini” - FO/EN | | 95,00 | 13,30 | | |
| LUS002020 | Síður til lux album 2020 | | 130,00 | 18,20 | | |
| JOS002020 | Síða til jól 2020 | | 30,00 | 4,20 | | |
| LUA002020 | Lux album III v/síðum 2015 - 2020 | | 680,00 | 95,00 | | |
| WFWORKS21 | Plakat: Floral Fireworks | | 150,00 | 21,00 | | |
| WALIEN021 | Plakat: Casual Alien | | 150,00 | 21,00 | | |
| | | | | | | |
| | | ***Avgreiðslugjald:*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur íalt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri! →

# Nýggj postgjøld 01.01.2021

| Innanoyggja brøv | | |
|---|---|---|
| Vekt | Brøv | Bræv-pakkar |
| 0 - 100 g | 17 kr | |
| 101 - 500 g | | 39,00 |

| Brøv til útheimin | |
|---|---|
| Vekt | Brøv |
| 0 - 100 g | 27 kr |
| 101 - 250 | 45 kr |

Meiri kunning um onnur postgjøld á posta.fo

**Gjaldshættir**

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps

☐ Upphæddin skal skuldskrivast kundakonto míni

☐ **Ja, takk.** Eg ynski at bíleggingar og hald framyvir skulu gjaldast sjálvvirkandi við gjaldskortinum niðanfyri:

**Av tí at føroysku bankarnir ikki góðtaka kekkar, ber ikki longur til at gjalda við kekki**.

**Eg ynski at gjalda bíleggingina við gjaldskorti:**

Kort nr.: ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐

Fyrningardagur: ☐☐☐☐

Upphædd: ____________________ Undirskrift: ________________________________________

Um tú ert skrásett/-ur sum kundi hjá Posta Stamps, verður tú vinarliga biðin um at upplýsa kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Navn: ________________________________________

Bústaður: ________________________________________

Postnr./býur: ________________________________________

Land: ________________________________________

T-postur: ________________________________________

Kundanummar: ☐☐☐☐☐☐☐

PS2020